## Perez skal ansa tranfer-marknaðinum

Forsetin í Real Madird, Florentino Perez, hevur í summar nýtt 2,2 milliardir krónur at styrkja sær um hópin. Tí tykist tað mest sum margháttligt, at hann nú er valdur til formann í serligari nevnd, sum hevur til endamáls at steðga ørskapinum, sum tykist vera á marknaðinum. Talan er um nevnd, sum er sett eftir ynski frá UEFA-forsetanum, Michel Platini. Nevndin varð sett, júst tí Platini hevðist at ørandi upphæddunum, sum Real Madrid nýtti í summar. Næstformaður í nevndini er David Gill, stjóri í Manchester United.



## KÍ kærir til starvsnevndina

KÍ hevur als ikki áhuga í at sleppa málið um spæliloyvið hjá Christiani Restorff Mouritsen. Í gjár sendi felagið skriv til Starvsnevndina hjá FSF, har tey staðiliga heita á nevndina um at lata Aganevndina taka støðu til málið viðvíkjandi spæliloyvinum. Í skrivinum sigur KÍ, at talan er um sera prinsipielt mál, tá flytingin fyrst varð noktað og síðani gjøgnumførd, hóast løgfrøðiligur ráðgevi mælti frá hesum.

1. deild kvinnur:

# Víkingur skutlaði AB

**Samstundis sum KÍ vann stórsigur á B68 og Skála vann trygt á EB/Streymi, mátti AB taka til takkar við javnleiki í Gøtu, og sostatt eru klaksvíkskvinnurnar farnar tvey stig framum tær á Argjum, nú bara trý umfør eru eftir av landskappingini**




Hilmar Jan Hansen

Í eina tíð hevur staðið á jøvnum í stigum millum KÍ og AB, men kortini hevur munur verið á, tí KÍ hevur havt so nógv betri málúrtøku. Men eftir umfarið um vikuskiftið øktist munurin ordiliga, tí nú er KÍ eisini tvey stig frammanfyri, og sostatt økist trýstið á AB.

Orsøkin til hetta var, at AB rendi seg í harða mótstøðu í Gøtu sunnudagin, har Víkingur tók ímóti. So mikið hørð var mótstøðan, at AB bert fekk eitt stig burtur úr dystinum – og enntá kundi farið avstað við púrt ongum, tá samanum kom.

Hetta merkir kortini ikki, at allur spenningurin í bestu kvinnudeildini er fokin, tí Vikingur – sum vit eisini hava nevnt fyrr – kann saktans koma at spæla ein avgerandi leiklut í oddastríðnum, hóast liðið hvørki kann vinna gull ella silvur, men longu nú við vissu endar við at fáa bronsumerkini.

Og eins og Víkingur tók stig frá AB, kann liðið gera tað sama sunnudagin, tá liðið vitjar KÍ í Klaksvík. Víkingur hevur fyrr í ár spælt javnt ímóti KÍ, og einki bendir á, at liðið er nakað viknað, síðani tað hendi í juni mánaði.

### Grind og bóltur

Hóast ein grind var hildin til í Gøtu, samstundis sum Víkingur sunnudagin hevði vitjan av AB, var heilt fitt av áskoðarum. Fleiri vóru komnir av Argjum og somuleiðis var heimafólkið væl umboðað kring vøllin, so karmarnir vóru góðir.

Talan var um ein javnan dyst, har tað nógva av spælinum var á miðvøllinum, men tá avtornaði, var tað óivað AB, ið hevði allar orsøkir til at fegnast meira um javnleikin, enn Víkingur. Tað vísti seg, at Víkingur hevði fleiri rættiliga góðar kjansir og betri møguleikar at fáa fleiri mál, enn AB hevði tað.

Steintóra Joensen legði annars AB á odda mitt í fyrra hálvleiki við einum dundurskoti úr 20 metrum, tá bólturin kom út til hennara eftir eitt hornaspark. Men fáar minuttir inn í seinna hálvleik svaraði Heidi Sevdal aftur og javnaði fyri Víking fyri eisini einum dundurskoti, ið brast í yvirliggjaran, niður í vøllin og so í málið.

Eftir útjavningina hevði Heidi enn eitt skot á yvirliggjaran, umframt at AB-málverjin, Simona Heinesen, í tveimum førum bjargaði væl. Størsta kjansin hjá AB hevði Mona Breckmann, sum fór avstað í høgru síðu, men úr spískum vinkli mátti síggja Annu Kristinu Joensen í málinum hjá Víkingi vera fyri.

### Greiðir sigrar

Í hinum báðum dystunum sunnudagin hendi einki óvæntað, tí báðir favorittarnir vunnu – og KÍ vann so mikið stórt, at málúrtøkan nú er heili 45 mál betri enn hjá AB, umframt tey bæði stigini, KÍ nú er frammanfyri.

Hesa ferð vóru klaksvíkskvinnur á Toftum og spældu ímóti felagsliðnum B68/NSÍ, ið tó einki fekk gjørt fyri at forða fyri skrædlinum. KÍ skoraði longu í fyrsta minutti og helt so fram og vann 9-1, eftir at hava verið á odda 4-0 í hálvleikinum. Minkandi málið hjá heimaliðnum kom ikki, fyrr enn KÍ var á odda 8-0, so tað pyntaði nóg illa um úrslitið.

Fyri KÍ skoraðu Sigrid Jacobsen, Rannvá Andreasen og Sofía Purkhús tvey mál í part, og Tove Sólheyg, Malena Josephsen og Randi Wardum skoraðu hvør sítt, harav tað hjá Randi var upp á brotsspark ímóti endanum. Einsamalla málið hjá B68/NSÍ skoraði Erna Svalbard.

Skála vann eisini sum væntað á heimavølli ímóti EB/Streymi, men her gjørdist ikki talan um stórsigur, hóast Skála hevði greiða yvirvág og nógv fleiri málkjansir enn teir báðar, ið góvu málini í 2-0 sigrinum.



**Sigrid Jacobsen var ein av trimum spælarum hjá KÍ, sum sunnudagin skoraðu tvey mál í part í stórsigrinum á B68/NSÍ. Av tí at AB spældi javnt ímóti Víkingi, fór KÍ nú tvey stig fram um kvinnurnar av Argjum**

Mynd: Hilmar Jan Hansen/Einslistir

Fríðrún Danielsen skallaði bóltin í málið til 1-0 í fyrra hálvleiki eftir eitt vælspælt álop, og í seinna hálvleiki var tað 15 ára gamla Birna Johannesen, ið staðfesti sigurin fyri Skála, sum leingi hevur ligið á einum tryggum fjórða plássi.

### 1. deild kvinnur

| Nr | Lið | Dystir | V | J | T | Mál | +/÷ | Stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 17 | 14 | 2 | 1 | 87- 7 | +80 | 44 |
| 2 | AB | 17 | 13 | 3 | 1 | 42- 7 | +35 | 42 |
| 3 | Víkingur | 17 | 9 | 4 | 3 | 36-20 | +16 | 31 |
| 4 | Skála | 17 | 6 | 1 | 4 | 21-43 | ÷22 | 19 |
| 5 | EB/Streymur | 17 | 2 | 1 | 14 | 8-58 | ÷50 | 7 |
| 6 | B68/NSÍ | 17 | 1 | 1 | 15 | 6-65 | ÷59 | 4 |

**B68/NSÍ-KÍ 1-9 (0-4)**
**0-1:** Sigrid Jacobsen
**0-2:** Tove Sólheyg
**0-3:** Sigrid Jacobsen
**0-4:** Rannvá Andreasen
**0-5:** Malena Josephsen
**0-6:** Sofía Purkhús
**0-7:** Rannvá Andreasen
**0-8:** Sofía Purkhús
**1-8:** Erna Svalbard
**1-9:** Randi Wardum

**Víkingur-AB 1-1 (0-1)**
**0-1:** Steintóra Joensen
**1-1:** Heidi Sevdal

**Skála-EB/Streymur 2-0 (1-0)**
**1-0:** Fríðrún Danielsen
**2-0:** Birna Johannesen